# Føroyskur einabúgvi á Svalbard



*Frá vinstru: Per Kyrre Reymert, rithøvundur, tosar her við føroyska einabúgvan, Louis Nielsen. Í miðjuni sveitsiska hjálparkvinnan Margrit*

**VEIÐUMANNALÍV**
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Svalbard, Sosialurin:** Uttast í Van Mijenfjørðinum á sunnarlaga á vesturstrondini á Svalbard liggur Akseloyggin sum ein bylgjubrótari og letir hendan fjørðin aftur. Báðumegin við er smøl sund inn móti fjarðarørmunum og við syðra enda býr vágbingurin Louis Nielsen. Hann hevur verið kallaður indianska navnið Hiawatha. Hann hevur í mong ár verið veiðumaður á Svalbard og býr meginpartin av tíðini einsamallur á hesi oyggj, har hann serliga livir av at savna æðudún, reinsa hetta og selja tað til dýnur og koddar niðri á europæiska meginlandinum.

Tað eydnaðist ikki Sosialinum at hitta Louis Poulsen undir fýra eygum, meðan vit vitjaðu í seinastu viku. Onki rutusamband er við oynna, og tað er bert hendingaferð at fartur er út, í samband við okkurt vísundaligt ferðalag, ella tá sýslumaðurin er á vitjan einaferð um árið. Men tað eydnðist at síggja oynna, hóast eitt sindur í fjarstøðu. Sosialurin vitjaði norska námsbýin Sveagruva, sum liggur longri inni í fjørðinum og á veg heimaftur hagani flugu vit nærhendis Akseloynni.

Louis er ikki lætttur at fáa hendur á hesa tíðina. Æðurnar liggja á og nú er tíðina at savna dún. Hann er úti tað eyguni eru opin. Sosialurin royndi alla seinastu viku og beint áðrenn heimferðina tíðiliga sunnumorgunin eydnaðist at fáa samband. Telefonin ringdi og Louis var i hinum endanum.

"Hvem er det, hvem taler han med, segði hann á rámun norðurnorskum og tað hoyrdist so illa, at drúgv tíð gekk, áðrenn hann fann útav at ein føroyingur var í hinum endanum.Men tá eg bar ørindi míni um eina samrøðu, var hann ikki heilt sinnaður, segði seg verða illa royndan av telefonsamrøðum við tíðindafólk, men gekk tó við til at ein minni grein varð skrivað í Sosialin, greinin sum tú situr við nú.

- Eg havi tað gott og líði onga neyð. Tú má endiliga heilsa heima í Fø.royum. Eg havi ikki verið heima síðan 1994, tá var eg eitt stutt rend. Tað hevði ikki verið so galið at verið heima Føroyum hesa tíðina, nú er vakurt, sigur hann og longsul er í røddini, meðan eitt heglingsæl er um at køva samrøðuna.

Er tað ikki einsligt at búgva soleiðis langt burtur frá fólki?

- Nei slett ikki og so einsamallur eru eg heldur ikki. Sig mær, tá tit flugu yvir her, hvussu sá ísurin út longur inni í fjørðinum, var hann minkaður nakað?

Eg hugsaði meg um, tað hevði eg ikki ordiliga gáa eftir, men ørmintist okkurt um, at rennur vóru at síggja millum stóru ísflakarnar. Men hvat um hann nú fór í bátin inn í fjørðin við mínum flogræðslumerktu eygleiðingum sum grundarlagi og kom illa fyri. Eg smekkaði til. Jú har var siglandi, og nýframkallaðu myndirnar, sum liggja á borðinum frammanfyri mær nú meðan hesar reglur verða skrivaðar prógva hetta.

- Sær tú, eg eri slett ikki so einsamallur. Ein kvinna úr Sveits kemur at hjálpa mær at savna dún í summar. Hon er í Longyearbýnum, men nú hevur viðrað so illa, at eg eri ikki sloppin eftir henni. Eg má fara at ringja til flogfelagið at vita hvussu stendur til við ísinum. So kemur hon við flogfarið til Sveagruva og eg kann fara eftir henni við bátinum.

## Irriterandi ísbjarnir

Tað sum ørkymlar Loyis mest í hesum døgum er ein ísbjarnamamma við tveimum ungum, sum raserar oynna. Ikki tí hann er bangin fyri henni, men heldur tí hann ikki fær hana í skotmála.

- Kemur hon so nær, so skjóti eg hana. Hon knúsar alt fyri sær har hon her. Hon hevur oyðilagt eina goymslu av dúni hjá mær og so rænir hon egg eisini. Men hon er klók, ella ræðist hon meg, tí hon syrgir altíð fyri at vera somikið langt burtur frá mær, at eg ikki fái skotið hana.Ísbajrnir kunnu verða rættuliga troyttandi og fleiri eru at síggja á landi í dag, tí ísurin er minkaður um summarið og so hava tær onga aðrastaðni at vera, sigur Louis Nielsen, eitt sindur umberandi.

- Eg havi ikki verið millum fólk síðan 25. mai, tá var eg ein túr í Longyearbýnum, sigur Louis, sum er errin av síni oyggj.. Hann hevur verið í mong á Svalbard og helt til fyrr á einum fjørði longur suðuri, nærhendis einum jøkli. Men so fór jøkulin knappliga at taka seg fram ,og Loyis mátti flyta. Hann fekk við tógvið stríð loyvi at seta seg niður á Akseloynni. Hon er friðað og tað var ikki bara sum at siga tað at fáa loyvi at byggja. Fólk á Svalbard eru fegin um at Louis býr á Akseloynni, tí hann eg dugnaligur og fer væl um. Í Longyearbýnum kennir ongin Louis, men nýtir tú eyknavnið Hiawatha, so er tað hvørt mannsbarn sum veit hvønn talan er um.

VITUS BERING
CENTER FOR
VIDEREGÅENDE UDDANNELSE

Kunningar-
fundur!

www.vitusbering.dk

Kunningarfundur um tekniskar útbúgvingar v.m.
Eisini verða broytingarnar í Byggifrøðingaútbúgvingini umrøddar.

Bygningsingeniør
Bygningskonstruktør
Kort- og landmålingstekniker
Maskiningeniør
IT-ingeniør
Eksportingeniør
Produktionsteknolog
Markedsføringsøkonom

Fundurin verður á Hotel Hafnia, Tórshavn
Hósdagin hin 27. juni 2002
kl. 19.00

Fulltrúi skúlans Johan Eli Ellendersen skipar fyri fundinum,
- hittist á tlf. +45 2338 2655
Øll áhugað eru hjartaliga vælkomin.

VITUS BERING
Center for
Videregående
Uddannelse

HAVNEN 1
DK-8700 HORSENS
TLF. + 45 7625 5000
FAX + 45 7625 5100
CVU@VITUSBERING.DK
WWW.VITUSBERING.DK



## UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:
### Bankar skelkaðir

Danski bankaheimurin er skelkaður eftir eitt rán í einum banka í Ålsgårde í Norðursælandi í síðstu viku, har ein ránsmaður skjeyt og drap ein mann, sum royndi at steðga ránsmonnunum. Ránið í síðstu viku var tað triðja í Nordea-bankanum í Ålsgårde seinastu vikurnar. Í danska bankaheiminum verður nú tosað um, hvat skal gerast fyri at forða ránum.

### Meiri olja

Triðja mánaðin á rað vaks oljuframleiðslan í OPEC-londunum í mai. Orsøkin var, at Venesuela framleiddi væl meiri enn vanligt, men framleiðslan vaks eisini í øllum hinum londunum við undantak av Indonesia. Sambært Middle East Economic Survey fór framleiðslan í OPEC-londunum upp um tær kvotur, sum londini hava ásett.

Í mai vaks framleiðslan í OPEC-londunum 762.000 tunnur um dagin upp í 24,9 milliónir tunnur. OPEC -londini fara á fundi í dag at taka støðu til, hvussu nógv tey skulu framleiða teir komandi tríggjar mánaðarnar.

### Fleiri ákærur

Størsta svikið við meirvirðisgjaldi, sum nakrantíð er avdúkað í Noregi, er nú eisini vorðið ein gøla um fíggjarsvik.

Stjórin á fiskivinnufyritøkuni OK Fish, Jarle Kvlaheim, varð í februar dømdur hálvt áttanda ára fongsul fyri grovt meirvirðisgjaldssvik, brot á skattareglurnar og roknskaparreglurnar. Tilsamans hevði hann svikað fyri einar 320 milliónir krónur.

Men málið er ikki liðugt enn, tí nú hava myndugleikarnir ákært fyrrverandi konu stjórans og ein svág hansara fyri fíggjarsvik. Sambært myndugleikunum hava tey bæði medvirkað til at útvega Jarle Kvalheim vinning á ólógligan hátt. Verða tey dømd, kunnu tey fáa ávikavist níggju og seks ára fongsul.

# Bush vil hava Arafat av vegnum

**Tað er ein fyritreyt fyri einari friðarloysn í Miðeystri, at palestinar velja sær annan leiðara, sigur amerikanski forsetin**

**MIÐEYSTUR**
*Árni Joensen*



*Amerikanski forsetin vil hava palestinar at velja sær annan leiðara fyri Yasser Arafat*
*Mynd: Reuters*

Amerikanski forsetin, George W. Bush, hevur nú almannakunngjørt, hvussu stjórnin í Washington metir útlitini fyri varandi friði í Miðeystri. Tað hendi, tá forsetin helt røðu uttan fyri Hvítu Húsini fyrrakvøldið.

Sum væntað boðaði Bush frá, at USA tekur undir við hugskotinum um eitt palestinskt ríki, men at tað kann ikki skipast beinanvegin. Í røðuni metti forsetin, at eitt fyribilsríki kann skipast innan hálvt annaðár, og at tað endaliga palestinska ríkið Palestina kann setast formliga á stovn um trý ár.

Tað, sum vakti størsta ans, var, at amerikanski for setin setti sum treyt, at palestinar fáa sær annan leiðara fyri Yasser Arafat. Bush nevndi ikki Arafat við navni, men tosaði um eina aðra palestinska leiðslu.

Sjálvur hevur Yasser Arafat ikki gjørt nakrar beinleiðis viðmerkingar til røðuna hjá forsetanum, men í einari kunngerð frá palestinsku myndugleikunum stóð, at palestinar eru fegnir um innihaldið í røðuni. Kravið um, at Arafat skal frá, varð ikki nevnt í kunngerðini, men palestinski samráðingarleiðarin, Saeb Erekat, segði í gjár, at Arafat er palestinskur forseti. Hann helt tað ikki vera neyðugt at siga meiri um tað.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, segði í sínari viðmerking gjáramnorgunin, at hann var fegin um tað, sum Bush hevði sagt um eitt palestinskt ríki. Spurdur, hvat hann helt um kravið um, at Arafatskal frá, svaraði Kofi Annan, at tað eru palestinar, sum gera av, hvør er teirra leiðari.

Politiskir eygleiðarar í Washington søgdu í gjár, at røðan hjá Bush var ikki nóg greið, og at nógvir leysir endar vóru í henni.

# Labour dregur frá andstøðuni

**Bretska stjórnin er betur umtókt nú enn fyri einum mánað síðani**

**BRETLAND**
*Árni Joensen*

Ein veljarakanning, sum blaðið The Guardian hevur gjørt, vísir, at stjórnarflokkurin Labour er nú tíggju prosent framman fyri tann konservativa andstøðuflokkin.

Eygleiðarar í London vísa á, at undirtøkan hjá flokkinum er vaksin tvey prosent hendan seinasta mánaðin, hóast Tony Blair, forsætisráðharri hevur verið fyri atfinningum seinastu vikurnar.

Kanningin hjá The Guardian vísir, at 42 prosent av teimum spurdu høvdu atkvøtt fyri Labour, var parlamentsval nú, meðan 32 prosent høvdu atkvøtt fyri teimum konservativu. Í einari tilsvarandi kanning fyri einum mánað síðani fekk Labour 42 prosent og tann konservativi flokkurin 34.

48 prosent av teimum spurdu siga seg vera nøgd við politikkin hjá Blair-stjórnini. 43 prosent eru misnøgd.

Úr Norðurlondum:
### Skip á land

Eingin fekk skaða, tá farmaskipið "Vestland" fór á land í Tróndheimsfjørðinum gjáranáttina.

Ein sleipibátur skuldi í gjár royna at toga tað 1388 tons stóra skipið avaftur. Tað er ikki greitt, hví skipið fór á land.

### Fáa skeiva viðgerð

Á hvørjum ári doyggja umleið 5000 danir, tí teir fáa skeiva viðgerð á landsins sjúkrahúsum. Samstundis vísir tað seg, at næstan 10 prosent av øllum sjúklingum liggja longri á sjúkrahúsi enn neyðugt, tí læknar ella sjúkrasystrar geva teimum skeivan heilivág, ella tí sjúklingarnir fáa skeiva skurðviðgerð.

Danska læknafelagið ásannar, at hesi tøl eru alt ov stór, og felagið mælir myndugleikunum tilat gera eina serliga fráboðanarskipan um tílík mistøk. Tað skal so bera í sær, at ábyrgdin verður løgd á rætta staðið, men at tann seki í flestu førum sleppur undan revsing. Ein tílík skipan ber í sær, at tað eru bara ávísir persónar, sum verða kunnaðir um mistøkini, og teir hava sjálvandi tagnarskyldu. Í USA hevur tað víst seg, at talið á mistøkum á sjúkrahúsunum minkaði 40 prosent, tá ein tílík fráboðanarskipan varð sett í gildi.

Skal ein tílík skipan setast í verk í Danmark, skal Fólkatingið samtykkja tað.

### Skulu hava hundaloyvi

Tríggir norðmenn hava nú skotið upp, at fólk, sum fáa sær ávís hundasløg, skulu hava loyvi frá myndugleikunum. Teir hava eisini skotið upp, at fólk, sum hava fingið dóm í sambandi við harðskap ella rúsevni, skulu ikki fáa loyvi at hava hund.

Hundasløgini, sum talan er um, eru sjefari, rottweiler, dobermann og american staffordshire terrier.